# Granat funnin á Havnarvág

**Leygardagin fann ein kavari, sum var í ferð við at eftirkanna arbeiðið hjá J&K Petersen eina granat á botninum út fyri Havnaskrivstovuna í Havn. Heiðrikur Christiansen, sum fann granatina sigur, at hetta er langt frá fyrstu ferð, at tílíkt er funnið á botninum út fyri Havnaskrivstovuna**

SPREINGILØGIR
*Solby A. Eliasen*



*Leygardagin varð eitt granathylstur umleið 70 til 80 sentimetrar langt funnið á botninum út fyri Havnaskrivstovuna í høvuðsstaðnum*

Granatin, sum varð funnin leygardagin, stavar helst frá einum skipi sum kom á Havnina undir seinna veraldarbardaga. Hildið verður, at ein partur av lastini er farin niður í millum keiina og skipið, meðan tað lossaði. Og er tað hesar sum javnan eru komnar undan kavi. Hetta er nevniliga ikki fyrstu ferð, at tílíkt verður funnið á botninum út fyri Havnaskrivstovuna. Kavarar hava verið niðri javnan síðani í januar mánaða, tá arbeiðið hjá teimum fyri J&K Petersen byrjaði, og tey hava funnið fleiri sløg av granatum og øðrum.

Fyrr í summar komu so serfrøðingar úr Danmark upp at kanna havbotnin, men hóast tey høvdu serútgerð við til tílíkar botnkanningar, so var onki at finna. Tað kemst helst av, at granatir og annað liggur so væl krógvað á botninum. Men tá so skip og bátar liggja við kei, kann skrúvan mala alt upp og so kemur sumt undan kavi.

Og leygardagin varð so ein granat funnin á botninum, sum verður mett at stava frá hesum skipinum.

Heiðrikur Christiansen, kavarin, sum fann granatina, sigur, at hann ikki er bangin fyri tílíkum, tí tað verður ikki mett at vera so vandamikið.

– Løðingin sat í granatini, men hetta slagið er ikki so vandamikið, tí tær eksplodera ikki, sigur Heiðrikur, sum metir hana vera um einar 70 til 80 sentimetrar langa.

Hann leggur tó afturat, at hetta tó ikki er nakað at spæla við, tí talan er um spreingiløgur.

Heiðrikur boðaði so løgregluni frá, og stutt eftir komu fólk frá Marinustøðini og tóku granatina upp. Hon er nú í varðveitslu hjá Færøernes Kommando.

### Granathylstur

Søren Skinderholm frá Færøernes Kommando sigur við Sosialin, at talan í hesum førinum ikki var um eina veruliga granat, men heldur eitt granathylstur.

– Hetta var eitt granathylstur, sum helst hevur verið ætlað til kanónirnar á Skansanum undir krígnum, greiðir hann frá.

Hann sigur, at hylstrið nú liggur í eini serligari trygdarbingju, har tað verður liggjandi til tað verður burtursprongt. Men her hevur Færøernes Kommando ein trupulleika. Tí tað finst onki egnað stað til tílíkar spreingingar, sum er. Færøernes Kommando hevur havt eitt stað á Glyvursnes til hetta endamál, men tað letur seg ikki gera longur, tí tað nú skal nýtast til annað. Síðani hevur Færøernes Kommando havt eina góða avtalu við Landsverkfrøðingin um nýtlsu av grótbrotinum, men tað verður heldur ikki mett at vera so heppið, tí tað kann ganga útyvir grótið, sum kann fáa metalstykkir í seg av øllum spreingingunum.

– So í skrivandi stund hava vit onki stað, har við kunna spreingja tílíkt burtur, staðfestir Søren Skinderholm. Og tað fer at gera tað trupult við at halda fram við at savna granatir og annan spreingiløg, sum verða funnin, inn.

Færøernes Kommando savnar so bert inn nú og hevur granatir og aðrar spreingiløgir í varðveitslu. Men hesar goymslur eru nú við at verða fullar.

Søren greiðir frá, at tað eru fastir reglar fyri, hvussu tílíkt skal verða goymt. Eitt nú eru ymiskar kategoriir, har tað verður goymt. Summar av hesum kategoriunum eru longu fullar. Men hylstrið, sum varð funnið leygardagin hoyrir til eina av kategoriunum, har goymslan ikki er full enn.

– Vit arbeiða sjálvandi við at finna eitt hóskandi stað til at spreingja tílíkt burtur, men enn hevur tað ikki eydnast at finna nakað. Søren Skinderholm sigur tó, at um fráboðan kemur um, at tílíkt verður funnið, so fara teir sjálvandi út at kanna tað, og um tað vísir seg at verða vandamikið, so verður tað tikið upp. Serstakliga, um tað liggur á landi.

Hann harmast sjálvandi um støðuna, sum hon er nú, men tað er eisini ein spurningur um teirra egnu trygd, og tí kunna tey ikki bara halda fram við at savna inn og hava alt í varðveitslu. Tað má eisini kunna sleppast av aftur við.

# Fíggjarnevndin játtar pengar til serviðgerð uttanlands

**Fíggjarnevndin hevur fingið umbøn frá Trivnaðarmálaráðnum um at játta 20 milliónir krónur til serviðgerðir uttanlands. Undirtøka er í nevndini fyri at játta pengarnar**

FÍGGJARNEVNDIN
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*Mál, ið viðvíkja arbeiðsmarknaðinum, liggja undir málsøkjum hjá fleiri landsstýrismonnum. Nú hevur Anfinn Kallsberg, løgmaður, átikið sær uppgávuna at samskipa arbeiði*

Eftir drúgt orðaskifti í løgtinginum fríggjadagin, har ákoyringarnar vóru nógvar móti landsstýrinum og Bill Justinussen, landsstýrismanni í heilsumálum, er málið nú endað í fíggjarnevndini. Av tingsins røðarapalli fríggjadagin heittu fleiri av fíggjarnevndarlimunum á landsstýrismannin um at koma við einum fíggjarnevndarskjali til nevndina, har biðið verður um tær 20 milliónirnar, ið mangla á játtanini í ár. Grundgevingin er, at hetta er nógv skjótari mannagongd enn at játta pengarnar á eini eykajáttanarlóg, ið annars verður fyrireikað í hesum døgum.

Og fríggjadagin fekk Fíggjarnevndin so umbøn frá Bill Justinussen um at játta tær 20 milliónirnar, ið mangla á kontoini til serviðger uttanlands, við einum fíggjarnevndarskjali.

Fíggjarnevndin hevði ikki viðgjørt umbønina frá Bill Justinussen, tá blaðið fór til prentingar. Men Óli Breckmann, formaður í Fíggjarnevndini, sigur, at eftir útmeldingarnar, m.a. frá fíggjarnevndarlimum, í løgtinginum fríggjadagin, metir hann undirtøku vera í Fíggjarnevndini fyri at játta pengarnar.



# Næraberg - eitt frálíkt skúlaskip hjá ungdómum

**Síðsta fríggjadag var Næraberg inni og bunkraði olju. Skipið fór avstað aftur longu beint eftir middag dagin eftir**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Næraberg er eitt risaskip, 94 metrar langur. Umborð eru 80 fólk, flestu ung*

28. februar í ár vóru tvey ár liðin, síðan risatrolarin, Næraberg, kastaði fyrstu ferð. Síðan hendan dagin, hevur skipið verið eitt frálíkt høvi hjá ungfólki, sum hava hug at søkja sjógvin, at sleppa til skips. Fíggjarliga hevur hetta verið ein tung tíð hjá skipinum, men við góðum samstarvi millum føroyingar og norðmenn og við ágrýtnum fólki á brúnni, dekkinum og á verksmiðjuni hevur higartil eydnast at hava skipið siglandi.

### Eingin ES-kvota

Tað var ein smeitur, at føroysk skip ikki sluppu í ES-sjógv at royna fyrst í hesum árinum, men kortini var tað eitt plástur á sárið, at fiskiskapurin í altjóða sjógvi royndist rímiliga væl í februar og mars. Veðrið var ólagaligt fyrst í árinum, og tað tarnaði fiskiskapinum í altjóða sjógvi.

Í samrøðu við Sosialin fyrr í ár, segði Mannbjørn í Grund, sum hevur verið við Nærabergi síðan í mai 2000, at tað kom ógvuliga dátt við, at skipið ikki slapp í ES-sjógv at royna í februar, mars og apíl, tí hetta plaga at vera teir bestu mánaðirnir av árinum.

Hesar mánaðirnar í fjør hevði skipið góðan fiskiskap í ES-sjógvi. Teir gjørdu tríggjar góðar túrar uppá ein mánaða hvør og høvdu fullar tangar, 770 tons av surimi, hvønn túrin. Seinasti túrurin av hesum trimum endaði í føroyskum sjógvi. Teir kastaðu í føroyskum sjógvi, 12. apríl og fingu nógvan svartkjaft.

– Vit høvdu vónað at fingið uppaftur meira burtur úr í ES-sjógvi í ár enn í fjør, tí surimi-framleiðslan umborð gongur nógv betri nú, eftir at broytingar eru gjørdar, og royndirnar við framleiðsluni eru fleiri. Tað var nú, vit roknaðu við einum gjøgnumbroti, og tað var nú, vit roknaðu við, at yvirskotið skuldi koma, segði Mannbjørn.

Við lækkandi oljuprísum og betri prísum á surimi vóru vónirnar hampiliga góðar fyrst í hesum árinum – ja, vónir vóru enntá um eitt hampiliga gott yvirskot við sama fiskiskapi í ár sum í fjør.

Japanesarar, sum keypa surimi-framleiðsluna hjá Nærabergi, eru við tíðini vorðnir meira kendir við hesa framleiðslu, tí frammanundan var surimi úr svartkjafti at kalla nýtt í teirra verð. Nú hava japs'arnir álit á, at Næraberg kann levera eina dygdarvøru og ikki minst, at hon kemur regluliga.

Við teimum broytingum, sum eru gjørdar á verksmiðjuni, er dygdin á surimi eisini vorðin betur, og framleiðslan hvørt samdøgur er økt.

### Inni og bunkraði

Síðsta fríggjadag var Næraberg inni og bunkraði olju, og teir fóru longu avstað aftur beint eftir middag dagin eftir.

Manningin mynstraði ikki av, tí hetta var framhald av túrinum, sum byrjaði fyri nøkrum vikum síðan.

Enn hevur skipið nakað av svartkjaftakvotu eftir í føroyskum sjógvi.

Veðrið var gott leygardagin, tá ið teir loystu, men skjótt øtlaði hann, og seinastu dagarnar hevur veðurlagið verið heldur vánaligt.

Við Nærabergi eru umleið 80 fólk, harav eini 26-28 konufólk.

Skipari hendan túrin er Andor Isaksen.



*Næraberg hevur verið eitt kærkomið »skúlaskip« hjá ungfólki, bæði gentum og dreingjum, sum vilja søkja sjógvin*




*Tey standa frammi á bakkanum, nú loyst verður. Skipið hevur bunkrað og er á veg avstað aftur*